

# Nevið fór við øllum

**Eingin hugsningur var um hjá kappingarneytunum at gera nakað við klaksvíkingarnar, sum vórðu kosnir besta manningin yvirhøvur**

ÓLAVSØKURÓÐURIN 8-MANNAFØR

*Jóannes Hansen*

Nevið Reyða gjørdist leygardagin stóri vinnarin. Fram við Molanum gleið 8-mannafarið hjá klaksvíkingum stútt og støðugt frá hinum bátunum, og hóast talan var um so stuttan róðrartein, sum tað onga aðra staðni er tað, so var fjarstøðan frá Nevinum Reyða og aftur til kapp-ingarneytarnar fleiri bátslongdir.

Umframt FM steyp og krónur og steyp og krónur fyri sigurin á Ólavsøku, so fingu klaksvíkingar eisini Útvarpssteypið norður aftur í viðførinum.

Kvívíkingurin var enn eina ferð næstbestur, men kappingin frá Ørvi og Argjabátinum var ógvuliga tøtt.

Tað kann væl vera, at hesar tríggjar manningarnar næsta ár fara at sleppa undan stinnu klaksvíkingunum, sum í ár hava verið so sera sannførandi. Eftir ólavsøkuróðurin varð tað endurtikið, sum fleiri ferðir fyrr í summar hevur verið at hoyrt í róðrarumhvørvinum í Klaksvík. Ábendingar eru um, at dreymurin skal gerast til veruleika, soleiðis at manningin, sum nú hevur vunnið FM við Nevinum Reyða, skal flyta umborð á Klaksvíkingin.

10-mannafarið í Klaksvík er rættuliga nýtt og ikki serliga nógv brúkt. Eftir glæsiliga róðrarárið hjá Klaksvíkar Róðrarfelag í 2001, tá ið eitt nú Nevið Reyða vann FM, smíðaði Sámal Hansen teimum 10-mannafar. Teir royndu seg við tí í 2002. Úrslitini vóru ikki so góð, sum tað hevði verið vónað og kanska roknað við, og úrslitaliga vóru kapprógvararnir í Klaksvík tey bæði bæstu árini í aldudali.

Men í ár hevur hilnast avbera væl, og nú umhugsa teir at seta sær nýggj og hægri kappróðrarmál.

*Róðursmaðurin á Nevinum Reyða, Oddur Olsen, stendur við Útvarpssteypinum eftir ólavsøkuróðurin*

*Mynd: Bárður*

# Gongurólvur vardi vertirnar

**Í tættastu kappingini av øllum megnaðu ungu garparnir, sum tað í Havnar Róðrarfelag verður sett stort álit á, at verja heiðurin hjá mannfólkunum í HR**

6-MANNAFØR MENN

*Jóannes Hansen*




*Manningin á Gongurólvi vann einasta FM-heitið á mannfólkasíðuni til Havnina*

Eyðkennið fyri flestu róðrarnar á Ólavsøku var, at sigrarnir vóru rættuliga sannførandi. Í kappingini millum 6-mannafør við monnum var Gongurólvur frammi í oddinum alla tíðina, og Gongurólvur staðfesti við sigrinum fyrsta FM heitið síðani í 1996. Á pappírinum kundi Gongurólvur missa FM heitið á ólavsøku, sum longu eftir Vestanstevnuna var undir borðinum, men í veruleikanum bar tað ikki til.

Gongurólvir verður ynskt hjartaliga tillukku við FM heitinum.

Kappingin var sera tøtt, og tað vóru fleiri um boðið. Spenningur var um, hvussu Strálan, sum á Vestanstevnu kom so at siga burturúr ongum og vann og tískil lá mitt í feltinum á Havnarvág, fór at standa seg. Strálan fekk einki serligan start, og Strálan tapti tøttu kappingina um fjórða plássið við Sølmund.

Gongurólvur fekk sera harða kapping frá meistarunum í 2004, Sundabátinum, og eisini Jarnbardi, sum fyrr í summar hevur givið Gongurólvi ein skarpan gang. Framvið Molanum tóktist tað sum um, at allir tríggir bátarnir eina løtu lógu stavn um stavn. Men Gongurólvur var stinnastur í endaspurtinum. Teir vóru skutin undan Sundabátinum, sum aftur var skutin undan Jarnbardi.

Góði ólavsøkuróðurin hjá Sundabátinum bar við sær, at teir í FM kappingini vunnu bronsumerkini frammanfyri Sølmund.

Gongurólvur vann einasta FM heitið á mannfólkasíðuni til Havnina. Í Havnar Róðrarfelag eru tey sera væl nøgt við avrikið hjá Gongurólvi, og tað verður roknað við, at ungu garparnir næstu árini fara at vera við til at lyfta felagið fram til nýggjar sigrar. Kanska onkrir teirra longu næsta ár fara at vera við til at manna Havnarbátin.